Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	30.09.2022
Mál nr.:	22/17171
Málsviðgjørt:	DH/JEK
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	22. september 2022

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Broyttur skattastigi og øktur barnafrádráttur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 10. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 1, nr. 2 til 5 verða orðað soleiðis:
"2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 265.000, verða kr. 0 latnar av kr. 65.000 og 15% av restini.
3) Er inntøkan kr. 265.000 ella hægri, men lægri enn kr. 370.000, verða kr. 30.000 latnar av kr. 265.000 og 20% av restini.
4) Er inntøkan kr. 370.000 ella hægri, men lægri enn kr. 800.000, verða kr. 51.000 latnar av kr. 370.000 og 25% av restini.
5) Er inntøkan kr. 800.000 ella hægri, verða kr. 158.500 latnar av kr. 800.000 og 30% av restini.

2. § 1, stk. 2, 1. og 2. pkt. verða orðað soleiðis:
"Skattur teirra, ið eru fevnd av § 25b, stk. 1, sbr. § 33, nr. 13 í skattalógini er 35%. Í tann mun tey í 1. pkt. nevndu rinda eftirløn, sbrt. eftirlønarlógini ella løgtingslóg um skatt av rentutryggingum, verður skattur teirra ásettur eftir frádrátt fyri hetta inngjald."

3. Í § 2, stk. 1, 1. pkt. verður "kr. 9.200" broytt til: "kr. 11.200", og "kr. 6.500" verður broytt til: "kr. 8.000".

4. § 8, stk. 2, 1. og 2. pkt. verða orðað soleiðis:

“Skattur teirra, sum eru fevnd av § 1 í skattalógini, er 35% av inntøkuni eftir frádrátt fyri inngjøld sbrt. eftirlønarlógini, um A-inntøkan stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS, ella skipi, sum eftir stk. 1, 2. pkt. verður javnmett við skip, ið er skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum annars lýkur treytirnar í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá. Inntøka eftir 1. pkt. verður tikin við í skattagrundarlagið, men í inntøkuskattinum skal loyvast ein frádráttur, sum samsvarar við tann partin av inntøkuskattinum, sum kann verða førdur til ta A-inntøku, sum stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2023.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í samgonguskjalinum stendur, at skattaskipanin skal broytast, so skipanin verður meira arbeiðs- og búskaparliga vakstrarfremjandi.

Mørkini í inntøkuskattinum eru ikki broytt síðani 2016. Inntøkuøkingin í samfelagnum ger tí, at stórur partur av vanligum løntakarum rindar ein høgan skatt av síðst tjentu krónuni, hóast inntøkan ikki er stór. Mørkini í verandi skattaskipan verða broytt soleiðis, at fólk við miðal inntøkum fáa ein lægri markskatt.

Samgongan ásannar eisini, at tað er neyðugt at geva barnafamiljum ein eyka lætta. Tí verður skotið upp at hækka barnafrádráttin við 2.000 kr. um árið fyri børn undir skúlaaldur og 1.500 kr. um árið fyri børn frá 7 til 17 ár.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært ásetingarlógini grein 1 verður inntøkuskatturin roknaður stigvaksandi sambært talvu 1 niðanfyri.

Talva 1

Er inntøkan (kr.)	men minni enn (kr.)	verða latnar (kr.)	av (kr.)	og av restini (%)
0	65.000	0	0	0
65.000	235.000	0	65.000	15
235.000	330.000	25.500	235.000	20
330.000	800.000	44.500	330.000	25
800.000+		162.000	800.000	30

Har afturat verður sambært grein 2 latin barnafrádráttur á 9.200 kr. fyri hvørt barnið, sum er undir 7 ár og 6.500 kr. fyri hvørt barnið millum 7 og 17 ár. Barnafrádrátturin verður veittur sum ein frádráttur í roknaða skattinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið er, umframt at lata føroysku familjunum ein lætta, at gera tað meira eggjandi at taka eitt eyka tak. Við at dagføra mørkini, soleiðis at fleiri fara at rinda ein lægri markskatt, fer tað fyri eina stóra fjøld av løntakarum við miðal inntøkum betur loysa seg at arbeiða.
Trýst er á arbeiðsmarknaðinum við lítlum og ongum arbeiðsloysi. Samstundis eru tað partar av løntakarunum, sum arbeiða niðursetta tíð - millum annað tí, at so stórur partur av eykainntøkuni fer í skatti, um farið verður upp í fulla tíð. Har afturat gera sosialu skipanirnar við familjuískoyti og fíggjarligum fríplássi tað, at samlaði markskatturin, serliga fyri stakar uppihaldarar, er sera høgur.

Hetta vil samgongan gera nakað við og skjýtur upp at lækka skattin við at broyta mørkini soleiðis, at endamálið verður rokkið, og tað loysir seg enn betur at arbeiða.


1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Skotið verður upp at hækka markið frá 235.000 kr. upp í 265.000 kr. og markið frá 330.000 kr. upp í 370.000 kr., sum víst í talvu 2.

Talva 2

Er inntøkan (kr.)	men minni enn (kr.)	verða latnar (kr.)	av (kr.)	og av restini (%)
0	65.000	0	0	0
65.000	265.000	0	65.000	15
265.000	370.000	30.000	265.000	20
370.000	800.000	51.000	370.000	25
800000+		158.500	800.000	30

Mynd 1



Mynd 1 vísir, hvussu flytingarnar av mørkunum broyta inntøkurnar hjá fólki. Fyri ein persón við eini mánaðarløn á 23.000 kr. merkja broytingarnar 125 kr. meira um mánaðin, meðan tað fyri ein, sum tjenar 30.000 kr. merkir 250 kr. meira um mánaðin.

Afturat broytingunum við at flyta skattastigini, verður skotið upp at hækka barnafrádráttin soleiðis, at hann verður 11.200 kr. fyri børn undir 7 ár og 8.000 kr. fyri børn frá 7 til og við 17 ár.

Fyri eina familju við tveimum børnum undir skúlaaldur, har foreldrini tjena 30.000 kr. um mánaðin hvør, vilja broytingarnar merkja eina sparing á 10.000 kr. um árið í skatti, sum svarar til góðar 830 kr. um mánaðin.

Kostnaðurin av fluttu inntøkumørkunum er mettur til at vera 56 mió. kr. í mistum landsskatti, meðan økti barnafrádrátturin er mettur til 23 mió. kr. Roknað verður við, at partur av skattalættanum fer til nýtslu og tí verður varisliga mett, at 9 mió. kr. koma inn aftur í øktum avgjaldsinntøkum. Netto kostnaðurin verður tí 70 mió. kr.

Nú uppskotið kortini verður broytt, verða § 1, stk. 2, 1. og 2. pkt. og § 8, stk. 2, 1. og 2. pkt. umorðað. Hetta verður gjørt fyri at fáa ein neyvari og lættari tekst.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

Fíggjarmálaráðið hevur tó samskift við TAKS um uppskotið

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið.
Kostnaðurin av uppskotinum er mettur til at vera 79 mió. kr. í mistum landsskatti. Roknað verður við, at partur av skattalættanum fer til nýtslu og tí roknar Fíggjarmálaráðið við at 9 mió. koma inn aftur í øktum avgjaldsinntøkum. Netto kostnaðurin verður tí 70 mió. kr.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Talan er um smáar broytingar í verandi skattastiga og tí verður ikki mett at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki beinleiðis ávirkan á vinnuna. Men skattalættin ger, at tað betur loysir seg at arbeiða. Tí verður roknað við at uppskotið ger, at vinnan lættari fær fatur í arbeiðsmegi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri fólk í arbeiði og barnafamiljur.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eitt skattauppskot, sum lættir skattin við at flyta tvey inntøkumørk uppeftir og økir um barnafrádráttin.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrismannin ella stovn undir landsstýrismanninum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1 og 3
Við ásetingini verða tvey skattastig í inntøkuskattinum broytt. Somuleiðis verður barnafrádrátturin hækkaður.

Nr. 2 og 4
Í § 1, stk. 2 og § 8, stk. 2 verða 1. og 2. pkt. umorðað. Hetta verður gjørt fyri at fáa ein neyvari og lættlesiligan tekst.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 30. september 2022.

Uni Rasmussen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur